FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøters gøta 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 12.01.2026
J. nr. (MEGD): 701-2-2026
J. nr. (BÚMR): 25/08929

Hoyringarskriv
Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt
(býti millum land og kommunu, tilboð og aldursbólkar, námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving)

Vit takka Barna- og útbúgvingarmálaráðnum fyri ein góðan hoyringarfund fyrst í januar mánað, fyri at MEGD varð tikið upp á ráð í sambandi við fyrireikandi arbeiði og fyri longda freist at senda ummælisskriv.

1. Vandi fyri mismuni

a. Rakar børn við breki serliga hart

Løgtingsins umboðsmaður kom í august 2023 fram til at § 3, stk. 2 í dagstovnalógini skal tulkast sum, at frítíðarskúlanir skulu verða *opnir gerandisdagar eins og dagstovnarnir og fylgja teirra ferium*, og ikki teimum longu feriunum hjá skúlunum.
Barna- og Útbúgvingarmálaráðið hevur verið ósamt í hesi tulking, og hava frítíðarskúlanir í høvuðsheitum fylgt einum prakis, sum sambært tulkingini hjá umboðsmanninum, hevur verið skeivur.
Tann stóri trupulleikin við verandi praksis – har frítíðarskúlarnir fylgja teimum longu skúlaferiunum - rakar børnini við breki lutfalalsliga harðari enn onnur børn og teirra familjur. Sambært § 5 í dagstovnalógini hava hesi børn rætt at ganga á dagstovni og frítíðarskúla á jøvnum føri við onnur børn.
Tann stranga og avmandi tulkingin av lógini raktar sum útgangsstøði øll børn, við tað, at tey fáa eitt verri tilboð enn eftir tulkingini hjá Løgtinsins umboðsmanni. Hesin prakis raktar tó børn við breki og teirra familjur lutfalsilga harðari enn onnur børn og familjur, við tað at hesi børn eru

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

viðbrekin og aloftast púra óhjálpin og klára seg ikki heima einsamøll. Foreldrini mugu heim at ansa teimum í teimum longu skúlaferiunum. Hetta gevur eitt ómenniskjaliga hart trýst á familjunar, við nógvari óvissu og inntøkumissi, og hava vit sæð hvussu tann ótrygga støðan gongur út yvir menningina hjá barninum.

Sambært uppskotinum til dagførda dagtovnalóg verður tann ivasami praksis við upplatingartíðunum hjá frítíðarskúlunum meira ella minni førdur víðari – **og nú lógarfestur.**

Sambært § 3 a í uppskotinum *kunnu* frítíðarskúlarnir (sum nú eita frítíðarstovnar) hava opið í skúlaferiunum. Kunnu, men teir nýtast tað ikki. Hetta svarar til soleiðis sum lógin hevur verið praktiserað higartil, har nakrar fáar kommunur at sínum eintingum hava bjóða frítíðarskúla í skúlaferiunum, men tær flestu gera tað ikki.

Yvirskipað veitir uppskoti til dagstovnalóg (framvegis) ikki nakra *ansingartrygd* á føroyskum dagstovnum, soleiðis sum vit kenna annars tað frá okkara grannalondum. Kommunurnar *kunnu* bjóða eitt dagstovnatilboð, men tær skulu ikki. Í uppskotinum er stórur lagdur á kommunala virkisfrælsi, har kommunurnar laga sítt tilboð eftir teirra staðbundnu fortreytum. Hetta við vanda fyri, at tilboðini verða ymisk og ójøvn frá kommu til kommunu, soleiðis sum m.a. Barnanna Umboðsmaður hevur ávarað ímóti (sí nærri umrøðu niðanfyri).

Tær kommunur, sum hava dagstovnatilboð sleppa tó ikki at toga tænastuna út og inn sum eina harmoninku eftir teirra egnu fortreytum. Viðvíkjandi upplatingartíðunum veitir uppskotið nevniliga børnum og foreldrum eina ávísa ansingartrygd, við tað, at § 3 a, stk. 2 í uppskotinum ásetir at dagstovnarnir sum eitt *mestamark* mugu vera feriustongdir 5 vikur um árið, og í mesta lagi 4 samanhangandi vikur.
Men hendan áseting er tó av onkrari grund ikki galdandi fyri frítíðarskúlarnar; sum harvið ikki fáa nakað garanti fyri, at teir framhaldandi *ikki* kunnu vera stongdir í skúlaferiunum, sum vara útvið 2 mánaðir.

Brekrættindasáttmálin hjá ST bannar sambært grein 5 mismuni vegna brek, bæði beinleiðis og óbeinleiðis mismuni. Verður lógaruppskotið samtykt ávirkar tað sum útgangsstøði øll, sum nýta hetta tilboð. Kortini rakar tað børnini við serligum tørvi og teirra familjur *lutfalsliga harðari enn onnur*, og tí er tað sannlík at ein slíkur praksis, sum nú verður beinleiðis lógarfestur kann vera ótilætlaður (óbeinleiðis) mismunur, í stríð við grein 5 í Brekrættindasáttmálanum.
Vísast skal til, at Føroyar við sáttmálanum hava átikið sær skylduna, at tryggja fólki við breki rættindini í sáttmálanum og at beina burtur allan mismun, og í hesum sambandi hava bundið seg til at *taka øll høskandi stig, eisini lógarlig, at broyta ella taka av tær lógir, ið eru í gildi, reglur,*

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

mannagongdir og siðvenju (practices), sum gera mismun á fólki, ið bera brek (sbr. grein 4, 1,b í Brekrættindasáttmálanum)

Smbrt. § 5, stk. 1 í dagstovnalógini hava børn við serligum tørvi atgongd til vanligu dagstovnaskipanina á jøvnum føti við onnur. Hetta er grundað á eina meginreglu um rættin til *inklusjón* og eitt *virðiligt* og *sjálvstøðugt lív*, sum liggur undir sosiallóggávuni sum heild og er eitt grundleggjandi prinsipp bæði í Brekrættindasáttmálanum og í Barnarættindasáttmálanum hjá ST, sum Føroyar eisini hava bundið seg til.

Hugsanin aftanfyri hetta er, at um tað ber til at klára seg uttan serstakar sosialar fyriskipanir, sum kunnu virka útihýsandi, er tað altíð best, og minsta inntrivið skal altíð veljast framum tað mest víðgongda. Hetta er eisini í samsvar við lutfalsmegniregluna (proportionalitets prinsippið).

Verður lógaruppskotið samtykt, soleiðis sum tað er orðað, kann avleiðingin verða, at serligar og *meira víðgondar* fyriskipanir eftir almannalógini mugu setast í verk í fyri at nøkta ansingartørvin hjá hesum útsettu børnum og sperdu familjum, sbr. § 39 í almannalógin, sbr. § 5 stk. 3 í dagstovnalógini. Um so verður kann tað ganga ímóti endamálinum við inklusjónini (í vanliga tilboðið), sum tey hava rætt til, smbrt. § 5, stk. 1 í dagstovnalógini, samanhildið við greinunum 24 (útbúgving) og 19 (sjálvræði og inklusjón) í Brekrættindasáttmálanum, hvørs aðalmál framgongur av grein 3 (c) í sáttmálanum:

at fáa fólk, ið bera brek, fullvegis og virkið at verða við í og verða tikin upp í samfelagið

Løgtingsins Umboðmaður hevur í niðurstøðu í klagumáli frá november 2024 greitt ávara um, at tann ivasama umsitingin av dagstovnlógini viðvíkjandi frítíðarskúlunm gjøgnum árini – sum nú verður lógarfest – lættliga kann elva til mismun móti børnum við serligum tørvi.

Skipanin við frítíðarskúlum er ásett við løgtingslóg, har støða ítøkiliga er tikin av Føroya Løgtingið til, at kommunur kunnu velja at hava tilboð ella ikki. Hetta letur upp fyri at tænastustøðið og tilboðini til børn kunnu vera sera ymisk kring landið. Givið er, at hetta á ein serligan hátt rakar familjur við børnum við serligum tørvi, sum ikki hava sama møguleika at lata børnini vera sjálvi.
Eg haldi meg ikki kunna siga, at sjálv lógin er í stríð við Barnarættindasáttmálan, men vil vísa á at umsitingin av henni, sambært tulkingini hjá ráðnum, lættliga kann føra við sær mismun og avbjóðandi umstøður fyri børn við serligum tørvi.

b. Vandi fyri staðbundnum mismuni

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Umframt vandan fyri at uppskotið fer at raka børn við breki og familjur teirra harðari við tað at tað nú verður lógarfest - ímóti lógartulkingini hjá Løgtingsins Umboðsmanni – at tað einki krav er, kommunurnar hava frítíðaskúlarnar opnar í skúlaferiunum, er vandi eisini fyri at uppskotið fer at elva til staðbundnan mismun. Tað vil siga, at munur kann verða gjørdur á børnunum alt eftir hvørji kommunu tey búgva í.
Lógaruppskotið leggur dent á og er kjølfest í virkisfrælsinum hjá kommununum, sum gongur aftur sum ein reyður tráðum í uppskotinum. Tað stendur nú soleiðis upp til hvørja einstaka kommunu at avgerða, *hvørt* tær vilja hava frítíðarskúlarnar at vera opnar í skúlaferiunum, sbr. § 3 a og *hvørt* tær vilja bjóða eitt frítíðarskúlatilboð til tey eldru børnin eftir 2. skúlaflokk, sbr. § 3, stk. 2, nr. 3. (sí nærri umrøðu niðanfyri).
Tað sjálvbodna elementið, sum nú er beinleiðis lógarfest, sær út til at vera heilt avgerðandi fyri uppskotssetararnar.
Eftir hesum fáa vit eina skipan, har nakrar kommunur kanska fara at hava fríðarskúlatilboð í skúlaferiunum og fara at bjóða frítíðarskúla eftir 2. flokk, meðan aðrar kommunur - allarhelst tær flestu - *ikki* fara at hava nakað slíkt tilboð.
Ì tilgongdini at evna til nýggja dagstovnalóg hava fleiri partar víst á vandamálið við, at vit fáa eina ójavna skipan, sum ikki tryggjar at øll børn, og í hesum sambandi eisini útsett børn við serligum tørvi, fáa somu tilboð og somu viðferð, líkamikið hvat í landinum teir búgva. Eisini Løgtingsins Umboðsmaður, sum eisini er Barnanna Umboðsmaður, hevur í klagumáli viðvíkjandi frítíðarskúlatilboðnum heitt á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at hava Barnarættindasáttmálan og barnsins besta í huga, nú dagstovnalógin verður endurskoða. Og hevur beinleiðis ávarað ímóti eini lóg, sum ger staðbundnan mismun á børnum:

Eg fari staðiliga at mæla til, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur Barnarættindasáttmálan, og undir hesum greinarnar 3 og 12, í huga í sambandi við arbeiðið at endurskoða dagstovnalógina og ætlanina at nágreina og broyta § 3 í lógini. Hetta so at komandi dagføringin av dagstovnalógini á neyðugan hátt lýsir og tekur støði í bestu loysn fyri Føroya børn, og at henda loysn slóðar fyri, at tað ikki er tilvildarligt, hvørja tænastu børnini fáa, og á hvørjum støði hon verður veitt, í mun til hvar í landinum tey búgva.

Tað er harmiligt at síggja, at hetta uppskotið tekur ikki tilmælið frá Barnanna Umboðsmanni til eftirtektar, men lógarfestir í staðin eina skipan, sum í verki hevur víst seg at hava stór lýti og hevur verið fyri stórum atfinningum. Bæði Brekrættindasáttmálin og Barnarættindasáttin áleggja Føroyum altíð at, at virka fyri barnins besta. Nevnast skal eisini at Barnarættindasáttmálin áleggur harafturat í grein 23 limalondunum at tryggja børnum við breki *virðilig* og *mennandi kor*.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

2. Eingin rættur til rímiligar tillagingar

Ein av hornasteinunum í Brekrættindasáttmaálanum er, at londini skulu útgeva fólki við breki rímiligar individuellar tillagingar, sum kunnu tryggja, at tey fáa javnrættindi í verki, sí grein 5, nr. 3 (javnviðgerð og ikki-mismunur), saman við grein 24, nr. 1 c (útbúgving) Londini hava sambært grein 4 skyldu, at tryggja, at hesi rættindi verða útint í innlendis lóggávu, og verða slíkar rímiligu tillagingarnar, sum skulu vera proportionalar, *ikki* útvegaðar, er hetta at mismunur í stríð við Brekrættindasáttmálani, sí grein 1, og allýsingin av mismuni á brekøkinum: *It includes all for of diskrimination, including denial of reasonable accomodation.*

Føroyar hava onga lóg móti mismuni vegna brek uttanfyri arbeiðsmarknaðin, og fáar lógir, um nakrar, hava ásetingar um rættin til rímiligar tillagingar. Brekrættindanevndin hjá ST hevur í seinastu frágreiðing síni frá september 2024 mælt Føroyum til at samtykkja eina slíka genrella lóg móti mismuni vegna brek, og hevur í hesum sambandi lagt dent á, at lógin má innihalda krav um rímiligar tillagingar, sí tilmæli 18 b.

Vísandi til hesi viðurskifti hevur MEGD mælt til at fáa hesa vernd móti mismuni við í eina komandi dagstovnalóg. Tað er eftir okkara tykki rættuliga ivingarsamt, at ein meginlóg á hesum øki sum dagstovnalógin er, ongar ásetingar hevur um rímiligar tillagingar vegna brek, serliga tá havt verður í huga at vit ikki hava nakra generella lóg móti mismuni vegna brek í Føroyum, sum lógarfestir og útinnur rættin til tillagingar eftir Brekrættindasáttmálanum.

3. Afturstig uttan heildarmeting

Tað sær út sum, at lógaruppskotið leggur upp til at skerja aldurhámarkið fyri frítíðarskúlatilboðið eftir dagstovnalóggávuni. Skotið verður upp í § 3 stk. 2, nr. 3 at orða lógina soleiðis, at frítíðarstovnar (sum frítíðarskúlanir/frítíðarheimini nú verða kallaðir) nú verða fyri børn frá forskúlaaldri til og við í minsta lagi 2. flokk. Við hesum er ætlanin at lógarfesta eina skipan, sum ikki er umrødd í verandi dagstovnalóg, men sum hevur verið praktiserað av myndugleikunum, sí lógarviðmerkingarnar til uppskotið.
Dagstovnalógin hevur í dag einki aldurmark fyri frítíðarskúlar/frítíðararheimini. Í § 2, stk. í kunngerðini um virksemi á m.a. dagstovnum og dagrøktum er tó ásett, at
frítíðarheim eru ætlað børnum í aldrinum 6 ár til umleið 18 ár
Lógaruppskotið sigur soleiðis um broytingina:

Tilboðið til endri børn – frá 3. flokki og uppeftir – verður hinvegin skilmarkað sum frítíðarklubbar og ungdómshús, sum hava eitt annað endamál, eitt annað fakligt grundarlag og skulu skipast

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

undir øðrum lógar- og figgingarstovnar enn dagstovnar. Hendan avmarking tryggjar greið rættarviðurskifti, javnbjóðis tilboð og fakliga røttu skipanina fyri hvønn aldurbólk.

Við uppskotinum verður frítíðarsskúlatilboðið til tey eldru v.ø.o. tikin burtur út dagstovnalógini og avmarkað við einum minstamarki til 2. skúlaflokk, so at tað svarar til ein praksis, sum tó ikki sæst aftur í dagstovnalógini í dag, men har kunngerðin tvørturímóti greitt sigur at aldurmarkið fyri frítíðarskúlar/frítíðarheim er 18 ár.
Rættarliga skyldan at skipa fyri frítíðarskúla verður við hesum minkað við 9-10 árum, og hetta verður gjørt *uttan* at uppskotið sigur nakað yvirhøvur um hvussu tilboðið so skal skipast fyri tey eldru børnini og *uttan*, at lógin t.d. ásetur nakað minstamark fyri hvat tilboðið skal innihalda, sernámsfrøði, børn við serligum avbjóðingum og t.d. hvørji rættindi børn hava kring landið skulu hava, sama hvørji kommunu tey búgva í. Eingin greining er gjørd av hesum viðuskiftum, eingin ætlan er gjørt fyri tilboðið til tey eldru. Alt hetta hongur í leysum lofti, samstundis sum ætlanin nú er at skerja tilboðið eftir dagstovnalógini, sum nú verður avmarkað til 2. flokk.

Hvussu henda avmarking kann trygga greið rættarviðurskifti, javnbjóðis tilboð og fakliga røttu skipanina er trupult. Kanska fyri myndugleikan, men ikki fyri (eldri) børn við breki í frítíðarskúlaaldri og foreldur teirra. Tvørturímóti. Altjóða Brekrættindasáttmálin byggir á eina meginreglu um, at rættindi sum eitt frítíðarskúltilboð – sum hoyra hoyra til bólkin av mentanarligum, figgjarligum og sosialum rættindum – eru tengd at figgjarvánum og ressursum hjá einstaka landinum. Grein 4(2) í sáttmálanum hevur tó eitt greitt krav um, at tað skal vera ein *proggressiv (stigvaksandi) tilgongd ella realisering av rættindunum*, og tiltøk, sum taka tilboð og rættindi aftur og eru úti av proportión, eru ikki í samsvar við sáttmálan. Negativ og tilvildarlig inntriv og afturstig í tænastur og rættindi hjá fólki við breki, sum ikki eru undirbygd av neyðugum greiningum og heildarmetingum, eru í ósamsvari við sáttmalan.

Júst hetta var ein av ávaringunum, sum Føroyar fingu frá Brekrættindanevndini hjá ST, í seinastu frágreiðingini frá 5. september í 2024, har nevndin í tilmæli 10 og 12 greitt ávarar ímóti sokallaðum regressivum stigum og skerjandi lóggávu og undirstrikar týdningin av, at londini hava eina brekpolitiska ætlan, sum kann forða fyri tilvildarligum afturstigum í rættindum og tænastum til fólk við breki.
Verður aldurmarkið fyri frítíðarskúlar lækkað við lóg – *uttan* at nakað verður sett í staðin og *uttan* at samlaða tænastan verður nærri útgreinað – kann hetta verða í stríð við meginregluna í Brekrættindasáttmálanum í grein 4(2).

Við hesum stigi verða børn við serligum avbjóðingum og teirra familjur slept upp á fjall. Tá hava eldri børnini í skúlaaldri við stórum avbjóðingum, og sum ikki megna at vera einsamøll eftir skúlatíð, onga vissu í lógini fyri longur, at tey kunnu fáa eitt frítíðarskúlatilboð eftir skúlatíð. Í

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

øllum førum ikki eftir tí vanligu integreraðu skipanini, sum verandi dagstovnalóg leggur upp til at tey skulu fáa, men noyðast tey tá helst undir eina ekskluderandi serskipan eftir almannalógini .

Sambært áðurnevnduniðurstøðuni hjá Løgtigsins umboðsmanni fráaugust 2023 merkir dagstovnalógin, at frítíðarskúlarnir skulu fylgja upplatingartíðunum hjá dagstovnunum og sostatt hava opið í skúlaferium. Verður tað nú lógarfest, at frítíðarskúlanir "kunnu" hava opið í teimum longu skúlaferiunum (men eisini kunnu verða stongdir) verður hetta – umframt omanfyrinevnda – eitt afturstig í rættindunum hjá børnum við breki í mun til tulkingina hjá umboðsmanninum, sum eisini er ósamsvari við grein 4(2) í Brekrættindasáttmálan og nevna tilmælið frá Brekrættindanevndini frá september í fjør.

Viðvíkjandi at áseta 2. flokk sum minstamark fyri frítíðarskúlatilboðið eftir dagstovnalógini skal eisini takast við í metingina, at sammett við grannalond okkara Danmark og Noreg, sum Føroyar kunnu sammetast viðv. ressursum og búskaparliga, er hetta eisini lágt sett. Í Danmark er tilsvarandi minstamarkið 3. flokkur og í Noregi er tað 4. flokkur, har kommunurnar eisini skulu bjóða børnum við serligum tørvi frítíðarskúlatilboð til 7. flokk.

Vinaliga vegna MEGD,

Ása Olsen *Forkvinna*	Bárður A. Ísheim *Aðalskrivari*	Dánjal Højgaard *Løgfrøðiligur ráðgevi*

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo